ÁRSFRÁGREIÐING **2015–16**

# LOYSNIR Á LOFTI



LANDSVERK
*byggir land*



# NÝGGJAR LOYSNIR TIL FÍGGING AV VIÐLÍKAHALDI




**Stóri tørvurin á viðlíkahaldi av infrakervinum og almennum bygningum undir landinum krevur, at tað mugu finnast alternativar loysnir, tí árliga játtanin á fíggjarlógini megnar ikki at fylgja við viðlíkahaldstørvinum. Harafturat er eitt stórt eftirsleip av viðlíkahaldi, sum onkursvegna má fáast aftur. Sum stjóri fyri avvarðandi stovn innan hesi økir er tað mín skylda at tala at, tí tað er beinleiðis ábyrgdarleyst ikki at taka støðu til og loysa trupulleikarnar. Alternativir møguleikar fyri fígging av viðlíkahaldi mugu á borðið nú, tí støðan er ikki haldgóð og versnar alsamt.**

Tað er eingin loyna, at árliga játtanin á fíggjarlógini til viðlíkahald av infrakervi og almennum bygningum ikki røkkur til tann stóra tørvin, sum er á viðlíkahaldi. Harumframt er eitt stórt eftirsleip, sum bara fer at vaksa komandi árini, um ikki neyðugi peningurin verður fingin til vega.

Í Samferðsluætlanini 2012–24 vístu vit á, at talan er um stór virðir í infrakervinum, sum samfelagið hevur fíggjað. Tað er tí av alstórum týdningi at halda infrakervið viðlíka og harvið fyribyrgja, at hesi virðir forfarast. Verður einki gjørt, má roknast við stórum endurreisingaríløgum.

Samlaða eftirsleipið er í skrivandi løtu mett at vera umleið 375 mió. krónur. Hetta er 8,5 ferðir árligu rakstrarjáttina, meðan hini Norðurlondini liggja á millum 1,2 og 2,6 ferðir árligu rakstrarjáttina. Sostatt hava Føroyar upp til sjey ferðir størri eftirsleip enn tey londini, vit samanbera okkum við.

Vøksturin í eftirsleipi stendur við og versnar, og sum stjóri á avvarðandi stovni er tað tí mín uppgáva og skylda at vísa á hesar trupulleikar og samstundis peika á loysnir, sum eru við hondina.

## Lægri tunnilsgjald

Tunlar eru minst tríggjar ferðir so dýrir at reka, sum vanligir vegir. Ein upplagdur møguleiki hevði verið at lagt allar tunlarnar undir eitt gjald fyri allar, í staðin fyri bert at krevja inn fyri undirsjóvartunlarnar. Her hugsi eg ikki um komandi Eysturoyar- og Sandoyar- tunlarnar, sum vera í eini serstøðu, til teir eru afturgoldnir. Eitt slíkt gjald fyri allar landtunlarnar og verandi undirsjóvartunlar kundi verið munandi lægri, enn tað er í dag fyri verandi undirsjóvartunlar, tí tá hevði brúkarafjøldin verið munandi størri. Somuleiðis hevði Landsverk tryggjað ein lægri rakstrarkostnað.

Gjaldið skuldi sjálvandi verið brúkaratillagað og ásett eftir, í hvussu stóran mun hvør einstakur bilførari nýtir tunlarnar. Tað vil siga, at samlaða gjaldið er hægst fyri tey, ið dagliga ella regluliga nýta tunlarnar, og lægst fyri tey, ið sjáldan nýta teir.

Tað ber somuleiðis til at gera sparingar í sambandi við verandi undirsjóvartunlar við at rationalisera raksturin. Við stórrakstrarfyrimunum kundi Landsverk átikið sær fyrisiting og rakstur við nærum somu manning, sum stovnurin hevur í dag. Hetta hevði spart munandi um fyrisitingina av feløgunum, sum í dag kosta umleið seks milliónir krónur árliga. Tá er raksturin av sjálvum tunlunum ikki íroknaður.

## Stórar inntøkur frá akførum

Ein annar spurningur er, hvussu landið nýtir tær inntøkur, ið beinleiðis stava frá akførum. So seint sum í apríl 2016 vísti eitt svar frá fíggjarmálaráðharranum til ein fyrispurning í Løgtinginum, at bileigarar hetta árið fara at rinda 360 mió. krónur í landskassan í skrásetingargjaldi, vektgjaldi, mvg og avgjøldum á brennievni. Til samanberingar fær Landsverk í ár slakar 43 mió. krónur til at halda vegir, tunlar og brýr fyri, har av umleið 10 mió. krónur verða nýttar til vetrarhald. Sostatt fara einans umleið 12 prosent av landsins inntøkum frá bileigarum til viðlíkahald av infrakervinum.

## Viðlíkahald av bygningum

Tíðin er eisini komin til at taka alternativar fíggingarhættir í brúk í sambandi við viðlíkahald av bygningum.

Um allir bygningar undir landinum vórðu fluttir til Landsverk at umsita, raðfesta, reka og krevja inn leigu fyri, høvdu bygningarnir altíð kunnað verið í forsvarligum standi.

Í dag er tað soleiðis, at stovnar og aðrir almennir leigarar ikki rinda leigu í teimum bygningum, sum landið eigur. Hinvegin rinda eitt nú Landsverk og aðrir almennir leigarar leigu, har onnur enn landið eiga bygningarnar. Eitt nú til útleigarar á privata marknaðinum. At munur soleiðis verður gjørdur á, um almenn virksemi heldur til ókeypis í einum almennum bygningi ella hjá øðrum útleigara, er beinleiðis kappingaravlagandi.

Tað hevði á ongan hátt verið órímiligt, at landið kravdi inn leigu fyri egnar bygningar, sum í mongum førum hevði rokkið til at rinda útreiðslurnar av bygningaviðlíkahaldinum. Í hvussu er partvís. Á tann hátt høvdu vit sloppið undan stórum parti av viðlíkahaldskontuni á fíggjarlógini.

Við at kravt inn leigu hevði eisini borið til at fingið eina hóming av, hvat veruligu útreiðslurnar hjá tí almenna eru innan hetta økið. Tí hóast einki leigugjald, sum nú er, minkar virðið á hesum bygningum støðugt orsakað av vantandi viðlíkahaldi. Tað er bert spurningur um tíð, til ein ikki viðlíkahildin bygningur er forfallin so nógv, at hann nærum gerst virðisleysur og ikki stendur til at bjarga.

Innkrevjing av leigu hevði eisini havt gagnliga ávirkan á raksturin, tí tá noyðast almennu leigararnir sjálvir at finna sparingar ella alternativar fíggingarmøguleikar av virksemi teirra. Úrslitið hevði sjálvandi verið ein samlað sparing í almenna húsarhaldinum.

## Seta inn í røttum tíma

Til tess at fyribyrgja forfalli hevur Landsverk í hyggju í størri mun at miðsavna viðlíkhaldið við at gera nýtslu av eini húsavarðartænastu, sum skal hava viðlíkahaldsuppgávur um hendi. Hetta fer at forða fyri forfalli, tí við eini slíkari tænastu, kunnu vit halda eyga við viðlíkhaldsstøðuni á bygningum og í røttum tíma seta inn, tá neyðugt er við størri ella smærri umvælingum.

Landsverk arbeiðir somuleiðis við einum orkuátaki – nevnt Orkutakið – sum fer at minka um orkunýtsluna og harvið minka rakstrarútreiðslurnar av teimum bygningum undir landinum, ið verða orkuumvældir. Eisini hetta fer við framtíðini í huga at bera í sær sparingar. Lesið meira um orkutakið og onnur áhugaverd evni aðrastaðni í ársfrágreiðingini.

ÚTGEVARI

Landsverk 2016 ©

RITSTJÓRN

Súsanna Mc. Birnie
*samskiftisráðgevi*

Kári Mikkelsen
*samskiftisráðgevi*

KELDUR

Leiðsla á Landsverki og onnur

RÆTTLESTUR
Levi Hentze

MYNDIR
HeinesenMyndir

SNIÐGEVING
Sendistovan

PRENT
Føroya Prent

Endurgeving
Við endurgeving av innihaldi í hesi ársfrágreiðing, skal Landsverk týðiliga upplýsast sum kelda



# GJÓGVIN MILLUM PRÍSTAL OG JÁTTAN VEKSUR ALSAMT

**Seinastu 11 árini eru útreiðslurnar av prísvøkstri í sambandi við viðlíkahald av infrakervinum hækkaðar við sløkum 8 milliónum krónum, meðan játtanin er lækkað við umleið 10 mió. krónum. Sostatt er gloppið, bara fyri at halda stand í sambandi við prístalsvøkstur, vaksið við umleið 18 mió. krónum hesi árini.**

Tøl tala fyri seg, og hyggur tú eftir gongdini seinastu 11 árini, sær dapurt út fyri viðlíkahaldi av føroyska infrakervinum á landi. Í 2005 var játtanin 53 mió. krónur, meðan hon í 2016 var minkað niður í 43 mió. krónur.

Samstundis er prístalið hækkað við tí, sum svarar til slakar 8 mió. krónur. Við øðrum orðum, skuldi játtanin verið umleið 60 mió. krónur – og ikki 43 mió. krónur – bara fyri at byrgja upp fyri prístalsvøkstrinum. Tá er hædd ikki tikin fyri vaksandi viðlíkahaldstørvi og eftirsleipi, sum eru munandi hægri tøl.

Verður einans hugt eftir tørvinum á viðlíkahaldi av infrakervinum skuldi Landsverk havt eina játtan á umleið 80 mió. krónur, áðrenn eftirsleipið byrjar at minka. Við núverandi støðu veksur eftirsleipið alsamt, tí tað er ómøguligt at halda stand. Sostatt fer viðlíkahaldsstøðan at versna enn meira komandi árini, um ikki játtanin verður munandi hækkað. Hetta merkir ikki einans vánaligari vegir, men fer sum frálíður at ganga út yvir ferðslutrygdina. Avleiðingin kann verða, at Landsverk á onkrum vegateinum noyðist at ráða løgregluni, sum er ferðslumyndugleiki, til at seta hámarksferðina úr 80 niður í til dømis 70 kilometrar um tíman.

Eftirsleipið á infrakervinum er mett at vera umleið 375 mió. krónur. Fyri tunlar er talið 150, brýr 25, asfaltering 100 og síðuøkir, ið eru bilverja, vegøksl, veitir, dren og skeltir, 100 mió. krónur. Havandi í huga árligu rakstrarjáttanina á 43 mió. krónur, er eftirsleipið sostatt 8½ ferðir hægri enn játtanin.

At tað kortini hevur eydnast Landsverki at hildið stand higartil, er millum annað takkað verið rationaliseringum og effektivum arbeiðsgongdum í viðlíkahaldinum og vetrarhaldinum. Eisini er stovnurin farin yvir til aftur at nýta tað minni kostnaðarmikla spræniasfaltið, ið hevur styttri livitið, men sum egnar seg væl til minni ferðslutungar vegateinar. Sparimarkið er nú nátt, og tí fer støðan á ongan hátt at halda frameftir.

## Rakstrarjáttan til infrakervið 10 ár aftur




*Í 2005 var rakstrarjáttanin til infrakervið slakar 53 mió. krónur, og í 2016 er tað fallið við umleið 10 niður í slakar 43 mió. krónur.*

## Asfaltering 11 ár aftur




*Reglulig asfaltering er sjálvandi grundleggjandi fyri viðlíkahaldið av vegakervinum. Sum sæst á hesi talvuni var í 2005 asfalterað fyri slakar 18 mió. krónur. Í fjør var upphæddin farin niður á stívar 7 mió. krónur, svarandi til eitt sindur oman fyri ein triðing av upphæddini 10 ár frammanundan. Vanliga verður roknað við, at ein kilometur av landsvegi í fullari breidd kostar umleið 1 mió. krónur at asfaltera av nýggjum. Havandi í huga, at landsvegakervið er umleið 475 kilometrar til longdar, tekur tað – við støði í núverandi játtan – 68 ár at koma runt. Til samanberingar hevur ein asfaltering eina livitíð á 12–20 ár, alt eftir, hvussu ferðslutungur vegateinurin er. Til tess at byrgja upp fyri hesum stóra trupulleika hevur Landsverk sett alternativ átøk í verk. Eitt nú við at fresa ferðslutungar vegateinar – sum tann millum Kollafjørð og Hósvík – so teir gerast slættari og tryggari at ferðast á, og við at nýta tað bíligari spræniasfaltið til smalri og minni ferðslutungar vegateinar, sum tað er væl egnað til.*

# BORGARIN YNSKIR HÆGRI VIÐLÍKAHALDSJÁTTAN TIL LANDSVERK

**Í nýggjastu Gallup kanningini, sum varð gjørd í byrjanini av 2016, framgongur tað greitt í fleiri viðmerkingum, at borgarin ynskir eina hægri politiska raðfesting av viðlíkahaldinum av almennum bygningum og infrakervinum hjá landinum.**

Fólkið hevur talað: „Í mun til ta játtan, Landsverk fær, røkja tey uppgávuna væl. Tey burdu fingið hægri játtan fyri at røkja uppgávurnar betur".

Síðani 2008 hevur Landsverk við jøvnum millumbilum bílagt nøgdsemiskanningar, har fólk verða spurd, hvat tey halda um tænastustøðið hjá Landsverki og um teirra nøgdsemi við stovnin sum heild. Í tveimum teimum seinastu kanningunum eru nøkulunda somu spurningar settir borgarunum, soleiðis at til ber at samanbera úrslitini og síggja, hvønn veg nøgdsemið flytir seg.

Úrslitið av kanningunum verður nýtt til at endurskoða tænasturnar, soleiðis at allar uppgávur altíð verða loystar á best møguligan hátt.

Sum víst á aðrastaðni í ársgrágreiðingini, ger Landsverk í dag nógv meira fyri eina væl minni játtan. Hóast hetta, eru borgararnir sum heild væl nøgdir við, hvussu Landsverk loysir sínar uppgávur. Hvussu hetta hongur saman, gevur Landsverk í hesi ársfrágreiðing svar uppá.

Í hesi seinastu kanningini frá 2016 hevur Gallup spurt 536 tilvildarliga valdar borgarar eldri enn 17 ár, ið eru umboðandi fyri allar føroyingar, hvussu teir sum heild eru nøgdir við stovnin.

Kanningin vísir nøkulunda sama úrslit, sum í 2015. Út av 7 møguligum stigum liggur nøgdsemið í allar flestu førum millum 5,0 og 6,0 í miðal. Serliga er tað trygdin á infrakervinum, veðurfráboðanir, kunningin og kavaruddingin, sum fáa bestu skoðsmál. Miðalkarakterurin fyri nøgdsemið var hesaferð 5,2 av 7,0 møguligum. Størst er nøgdsemið í Sandoynni, meðan lítil og ongin munur er millum hini økini.




*Hendan talvan vísir nøgdsemið á einum stiga frá 1–7 til spurningin um, hvussu samd tey spurdu eru í hesari útsøgn: „Sum heild eri eg nøgd ella nøgdur við Landsverk". Á talvuni sæst, at miðal nøgdsemið við Landsverk er 5,2 av 7,0 møguligum (Kelda: Gallup Føroyar).*

## Vetrarhaldið og fráboðanin um veðrið

Fyri kavaruddingina fær Landsverk 5,6 stig í miðal. Kavaruddingin hevur fingið góð skoðsmál í øllum nøgdsemiskanningum, sum stovnurin hevur latið gjørt síðani 2008.

Fráboðanin um veðrið fær miðalkarakterin 5,8, sum er tað sama sum í fjør. Her geva tey ungu í aldursbólkinum 18–24 Landsverki heili 6,1 stig av 7,0 møguligum. Tað kann vera, at hetta hevur nakað við nýtsluna av veðurappini hjá Landsverki at gera, at tað serliga eru tey ungu, ið brúka veðurappina.

## Smærri trygdartiltøk gera stóran mun

Nógvar smærri dagføringar hava verið á ferðslutrygdarøkinum seinasta árið. Meðan nøgdsemið við trygdina á vegunum er meira ella minni tað sama, so er nøgdin við trygdina í tunlunum betrað í mun til seinastu kanning.

Hesaferð eru tað serliga tey ungu, ið geva bestu skoðsmál og borgarar í Norðoyggjum og Norður Streymoy.

Fyri at betra um trygdina setti Landsverk fyri nøkrum árum síðani út í kortið at fáa trygdarútbúnað í teir gomlu tunlarnar – trygdarútgerð, so sum rýmingarljós, eldsløkkjarar og fartelefonsamband. Sjálvt um røddir hava verið frammi um, at trygdin í gomlu tunlunum framvegis ikki er nøktandi, so vísir úrslitið í nýggjastu nøgdsemiskanningini, at fólk hóast alt halda, at trygdin í tunlunum er betrað seinastu fimm árini.




*Talvan vísir, at nøgdsemið við vegatrygdina er tað sama sum í 2015, meðan nøgdsemið við tunnilstrygdina er betrað. Eisini halda 32% av teimum spurdu, at asfaltið er betrað í mun til 29% í 2015 – ein lítil framgongd.*

## Vegvísingarskeltir verða dagførd

Í nøgdsemiskanningini frá 2015 vóru tað fleiri av teimum spurdu, ið vístu sína ónøgd við skeltingina á landsvegunum. Hetta hevur Landsverk valt at gera nakað við. Fyri 2–3 árum síðani vóru skeltini í Sandoynni dagførd, í Vágoynni í fjør, og hildið verður fram í ár at seta upp skeltir í Suðuroynni. Skeltingin fær eisini betri skoðsmál hesaferð enn í seinastu kanning.

## Landsverk kann gott blanda seg meira fakliga í miðlunum

Landsverk fær sera góð skoðsmál fyri kunningina frá stovninum, sum fær heili 6,0 av 7 møguligum stigum frá aldursbólkinum 18–24 ár og í miðal 5,6.

Hinvegin verður tó víst á, at Landsverk gott kann blanda seg meira fakliga í miðlunum. Tá ið Landsverk úttalar seg, er tað fakliga í lagi, vísir kanningin millum annað eisini. Sostatt eru boðini greið: Landsverk kann gott geva samfelagnum størri fakligt mótspæl í almenna rúminum við at vera meira luttakandi fakliga.




*Spurningurin ljóðaði, hvussu samd/-ur ert tú í hesum: Kunningin frá Landsverki er nøktandi… Kunningin fekk 5,6 stig, sum er tað sama sum árið frammanundan.*

### Viðmerkingar frá teimum spurdu:

Landsverk skal fáa størri játtan til viðlíkahald av almennum bygningum. Teir forfarast ov illa, tí har er ov lítið av pengum.

Landsverk klárar seg væl, tá hugsað verður um, hvussu nógv verður spart.

Tað verður spart ov nógv innan bygging. Tí er tað dømt til at miseydnast.

Landsverk skal gevast við at framleiða asfalt og knúsa grót. Tey eru betri til at rudda kava, og skuldu ráðgivið um trygd í ferðsluni úti á landsvegunum.

Tá Landsverk ruddar kava, verður grivið fyri innkoyringarnar, so tú ikki sleppur inn til húsini hjá tær.

Skeltingin kundi verið betri, og tað skuldi verið betri upplýst, hvørjar bygdir koma.

Landsverk skal fáa politikkararnar at virða seg meira, so tað, Landsverk leggur á borðið, verður fylgt.

Í mun til ta játtan, Landsverk fær, røkja tey uppgávuna væl.

Seyðurin skal av vegnum.

Politikkarar blanda seg ov nógv upp í arbeiðið hjá Landsverki.



*Landslæknahúsini áðrenn umvæling*



*Landslæknahúsini aftaná umvæling*



# VEGIR MINKA BYGNINGAR VAKSA

**Ikki óvæntað, eru stórar flytingar í sambandi við nýíløgur innan alment byggivirksemi undir landinum. Stórar íløgur verða gjørdar í bygningar í hesum árum, meðan tølini fyri landsvegir og tunlar eru munandi lægri.**

Landsvegakervið er eftirhondini sera væl útbygt, hóast økta ferðslan hevur gjørt tað neyðugt at fara undir nýggjar tunlar.

Burtursæð frá Viðareiðistunlinum, ið er ein rættiliga stór íløga, er tað í nógv størri mun innan nýggjar bygningar, at tær størstu íløgurnar eru framdar seinnu árini, og sum fara at mynda bróðurpartin av nýíløgum næstu árini. Tá verður sæð burtur frá komandi undirsjóvartunlunum, ið eru skipaðir í einum almennum partafelagi og verða í stóran mun brúkararindaðir.

Í hesum árum er Skúladepilin við Marknagil, Glasir, sum eftir tíðarætlanini skal vera liðugur við skúlaársbyrjan næsta ár, ikki óvæntað størsta íløgan. Verkætlanin er umrødd aðrastaðni í hesi ársfrágreiðing.

Ein onnur risaíløga er útbyggingin av Landssjúkrahúsinum. Prosjekteringin er komin undir land, grundøkið verður í løtuni gjørt byggibúgvið, og arbeiðið við sjálvari byggingini fer væntandi í gongd í ár. Eftir ætlan skal nýggi H-bygningurin, ið millum annað fer at hýsa psykiatriskum depli, medisinskum seingjardeildum, føðideild, uppvenjingarhølum og køki, verða liðugur á heysti 2020.

Seinnu árini eru eisini gjørdar stórar íløgur í eitt nú skúlar, sambýlir, deplar, vardar bústaðir og annað innan serliga mentanar-, almanna- og heilsuøkið.

Á talvuni niðanfyri sæst, hvussu játtanirnar til nýíløgur eru býttar millum bygningar, landsvegir, havnir og tyrlupallar í tíðarskeiðinum frá 2005 til og við í fjør.




*Í 2005 vóru næstan líka stórar íløgur gjørdar í vegakervið, sum í almennar bygningar. Ávikavist 69 og 72 mió. krónur. Í fjør var talið ávikavist 95 og 193 mió. krónur, og hendan gongdin fer uttan iva at halda fram komandi árini.*

# GONGD Á NÝGGJA MIÐNÁMSSKÚLANUM

**Umstøðurnar verða góðar, sum næmingar og starvsfólk fáa, tá tey næsta ár flyta inn í nýggja miðnámsskúlan við Marknagil. Glasir skal eftir ætlan takast í nýtslu við skúlaársbyrjan í 2017.**

Tað, sum farið er av 2016, hevur gingið væl við byggingini av nýggja miðnámsskúlanum við Marknagil, Glasir, og størsta byggiverkætlan í Føroya søgu hevur nú av álvara fingið skap. Í apríl 2016 var bygningurin í fullari hædd, og í skrivandi løtu eru stórir partar av glasfasaduni komnar upp á pláss.

Rundi høvuðsbygningurin í seks hæddum rúmar øllum teimum vanligu undirvísingarhølunum, eins og hesin bygningurin er sambindingarliðið til allan skúlan, sum nú eitur Glasir.

– Fyri okkum sum fakfólk er tað bæði spennandi og stuttligt at sleppa at byggja nakað, ið er so nógv øðrvísi, enn tað, vit fyrr hava sæð í Føroyum. Sjálvur gekk eg í síni tíð á Tekniska Skúla, og eg síggi hetta sum eitt risa framstig fyri næmingarnar at fáa hesar karmarnar, sigur Arne Debess Madsen, leiðari á Byggildeildini á Landsverki.

Hann leggur dent á, at sjálvt um arbeiðið nú er komið rættiliga langt, so eru framvegis stórar avbjóðingar í verkætlanini.

– Vit arbeiða sjálvandi fram ímóti at verða liðug til ásettu tíð næsta ár, og tað trúgvi eg upp á fer at ganga. Men fortreytin er, at alt klappar frá nú av, sigur Arne Debess Madsen.

Verkætlanin hevur verið rakt av nógvum trupulleikum. Millum annað er ein stórur undirveitari hjá donsku arkitektafyritøkuni BIG, sum hevur teknað og er heildarráðgevi í sambandi við Skúladepilin við Marknagil, farin á húsagang. Talan er um undirveitaran, Lemming & Eriksson, sum gjørdi nógv umrøddu roknivilluna, ið eisini hevur havt meirkostnað við sær. Somuleiðis hava verið ósemjur í sambandi við arbeiðstakarakostnaðin, ið fyribils eru lagdar fyri ein gerðarrætt.

Málið er at flyta inn í Glasir við skúlaársbyrjan í 2017, tá Føroya Handilsskúli, Føroya Studentaskúli og Tekniski Skúli verða niðurlagdir. Talan verður tá um ein og sama skúla undir einum taki við øllum teimum nýggju møguleikunum at seta útbúgvingarnar saman øðrvísi og í størri mun tvørfakliga.




## Fakta

**Arbeiðsánari**: Mentamálaráðið
**Byggiharri:** Landsverk
**Tekniskur ráðgevi:** Bjarke Ingels Group, BiG
**Tíðarætlan:** Takast í nýtslu við skúlaársbyrjan í 2017
**Kostnaðarætlan:** 515 mió. kr., íroknað innbúgv og annað
**Skúladepilin:** Verður umleið 19.500 fermetrar til støddar og fer at hýsa 1.500 næmingum. Byggingin er sett soleiðis saman, at undirvísingin kann skipast kreativt, nýhugsandi, eins og hon skal verða fakliga og námsfrøðiliga slóðbrótandi. Til tess at lúka framtíðarinnar ókendu krøv til undirvísing, er byggingin myndað við smidligum loysnum og fjøltáttaðum rúmleika, eins og partar av skúlanum vera opnir fyri næmingum alt samdøgrið.





# FRAMÚR MØGULEIKAR FYRI NÆMINGAR Á GLASI

**Hóast byggingin av Skúladeplinum við Marknagil, sum nú eitur Glasir, hevur verið merkt av størri og smærri trupulleikum, sær rektarin, Bogi Bech Jensen, ljóst upp á framtíðina hjá teimum næmingum, ið koma at ganga har.**

Søgan við nýggjum miðnámsskúla í Havn er long, men endaði sum kunnugt við eini spennandi verkætlan úti við Marknagil.

Tað liggur í útgangsstøðinum fyri eina stóra byggiverkætlan, at hon hevur sínar avbjóðingar, tí eingin byggiverkætlan er eins. Soleiðis hevur eisini verið við Glasi, nú bygningurin er komin upp, og eftir ætlan skal takast í nýtslu við skúlaársbyrjan í 2017.

Í mai 2015 varð Bogi Bech Jensen, professari, settur sum rektari fyri Glasir, og hann hevur stórar ætlanir við nýggja miðnámsskúlanum, ið fær bestu fysisku karmar, sum eitt skúlaumhvørvi kann bjóða.

Talan verður um ein samanlagdan studentaskúla, handilsskúla og tekniskan skúla við einari leiðslu.

– Vit hava ein stjórabólk á verandi skúlum, sum eg møtist saman við eina ferð um vikuna, har vit umrøða, hvussu vit gera nú, og hvat skal gerast frameftir. Vit hava skyldu at taka øll verandi starvsfólk við yvir á Glasir, og tí eru øll nýggj størv lýst leys innanhýsis á skúlunum, sigur rektarin, sum eisini er formaður í bygginevndini fyri skúlan.

Umleið 250 starvsfólk starvast á teimum trimum verandi skúlunum, ið svarar til stív 200 ársverk.

## Nýggjur bygnaður

Í skrivandi løtu væntar Bogi Bech Jensen, at nýggi bygnaðurin á skúlanum væntandi er komin endaliga upp á pláss tvær til tríggjar vikur inn í mai 2016.

Hóast nýggi skúlin sjálvandi er bundin at teimum kunngerðum og lesiætlanum, sum útbúgvingarnar byggja á, hevur rektarin stórar ætlanir við at veita komandi næmingum nýggj útbúgvingartilboð.

Eitt nú við at endurskoða handverksútbúgvingarnar, so tær kunnu kombinerast við til dømis onkra handils- ella studentalærugrein og øvugt, ella okkurt heilt triðja og fjórða. Møguleikarnir fyri at seta útbúgvingarnar saman á ein nýggjan hátt eru stórir.

Eisini skal bera til at ganga á eini búskaparbreyt og eitt nú taka alisfrøði við síðuna av, ella gera aðrar kombinatiónir.

Danir hava havt stórt hepni við sonevndu EUX-útbúgvingini, har arbeitt verður við at kombinera miðnám við handverksúbúgvingarnar, sum er vorðið rættiliga væl umtókt millum næmingarnar. Nakað, sum uttan iva í størri ella minni mun fer at verða á Glasi. Talan er um eina útbúgving, ið gevur vinnulívinum og øðrum arbeiðsplássum størri møguleikar at fáa fólk við breiðum førleikum. Somuleiðis verða møguleikarnir samsvarandi betri fyri tey ungu, tá tey leita sær út á arbeiðsmarknaðin. Talan eru um eina útbúgving, sum tekur 4½ ár.

– Slíkar broytingar eru sjálvandi nakað, vit mugu taka upp við Mentamálaráðið og skúlaumhvørvið, og gera tað í felag. Eisini kundu vit hugsað okkum at bjóða út aðrar, nýggjar útbúgvingar sum byggitøkni, framleiðslutøkni, marknaðarføringarbúskap og fíggjarbúskap, ið verða uppstigaðar til bachelorstøði.

## Menning og dannilsi eru lyklaorð

Spurdur um, hvat hann sær sum sína størstu uppgávu sum rektari á Glasi, sigur Bogi Bech Jensen:

– Samfelagið mennist við øgiligari ferð, og vit innan skúlaverkið skulu ikki bara royna at fylgja við, men helst ganga undan. Vit fara tí bæði í leiðslu og innan læraratoymið at hava áhaldandi fokus á menningarmøguleikar. Næmingarnir skulu hava møguleika fyri at kunna taka mest møguligt í Føroyum, áðrenn teir kanska fara undir at viðariútbúgva seg á hægri lærustovni, sigur Bogi Bech Jensen.

Sum nú er hava teir tríggir skúlarnir nakað av møguleikum fyri at útbúgva næmingarnar tvørfagliga og at samstarva tvørtur um skúlamørk. Við at vera í einum og sama bygningi, verða teir møguleikarnir nærum óavmarkaðir.

– Ein tann mest týðandi uppgávan hjá okkum er at geva næmingunum dannilsi, har úrvalið er so breitt og skilagott sum møguligt. Vit hava ikki serútbúgvingar, men skulu gera tær so breiðar sum møguligt, tí lívið uttan fyri skúlaumhvørvið er og verður altíð tvørfagligt, óansæð hvar tú ert í samfelagnum ella á arbeiðsplássum. Uppgávan hjá mær sum rektari er altíð at hava fokus á, at næmingar og starvsfólk áhaldandi hava menningarmøguleikar, sigur Bogi Bech Jensen.

Bæði tað praktiska og handaliga á Tekniska Skúla, handilsfakini og tað búskaparliga á Handilsskúlanum, og tað ástøðiliga, vísindaliga og kreativa úr Hoydølum skulu geva møguleikar fyri at seta útbúgvingar saman á ein nýggjan hátt við størri úrvali. Tann møguleikin verður á nýggja miðnámsskúlanum í høvuðsstaðnum, hóast tað sjálvandi eru lærararnir, ið fyrst og fremst mynda skúlan, læruna og harvið støðið og góðskuna á útbúgvingini hjá næmingunum.









*Rektarin á Glasi, Bogi Bech Jensen, sær ómetaliga stórar møguleikar í nýggja miðnámsskúlanum við Marknagil, sum verður ein samanlagdur skúli millum teir tríggjar núverandi miðnámsskúlarnar í Havn, Studentaskúlan, Handilsskúlan og Tekniska Skúla.*




# VIÐAREIÐISTUNNIL LANGT ÁÐRENN TÍÐ

**Upprunaliga ætlanin var, at Viðareiðistunnilin skuldi vera liðugur á sumri 2017. Skjótt gjørdist tó greitt, at tað verður munandi fyrr, at viðingar og onnur vitjandi sleppa undan tí lítið umtókta Viðareiðisvegnum, har tað javnan eru trupulleikar við grót- og skriðulopi.**

Longu í summar verður latið upp fyri nýggjasta tunli í Føroyum, sum er Viðareiðistunnilin.

Burtursæð frá sjálvari byrjanini, har trupulleikar vóru við leysum tilfari, sum millum annað gjørdi, at neyðugt varð at flyta tunnilsmunnarnar bæði hvannasunds- og viðareiðismegin, hevur arbeiði gingið bæði skjótt og væl. So væl, at tunnilin verður liðugur eitt lítið ár undan upprunaligu tíðarætlanini.

Sum játtanin varð skrúvað saman, tá Føroya Løgting í 2013 samtykti at játta pening til at gera nýggja farleið til Viðareiðis, varð lagt upp til at taka tunnilin í nýtslu í 2017. Tað gjørdist tó skjótt greitt, at um ikki stígur skuldi koma í arbeiðið hjá samtakinum millum Articon og norska LNS, ið vunnu lisitatiónina um verkætlanina, mátti játtanin framskundast og ásetast yvir styttri áramál.

Landsverk mælti tí til at endurskoða tíðarætlanina í játtanini. Hetta tók Løgtingið til eftirtektar, so tunnilin kundi gerast liðugur uttan nakran steðg í arbeiðinum.

Sum tað stendur í verkætlanarlýsingini er endamálið við Viðareiðis-tunlinum at tryggja eina hóskandi farleið til bygdina, tí trupulleikar eru við grót- og skriðulopum á Viðareiðisvegnum, umframt at stórur partur av vegnum er einbreytaður.

Verkætlanin fevnir um ein umleið 1,9 kilometrar langan tunnil úr Hvannasundi til Middals og tilkoyringarvegir á umleið 4,0 kilometrar, har meginparturin av teininum liggur millum tunnilsmunnan í Middali og bygdina Viðareiði.

Tunnilin, sum varð boraður igjøgnum í juli 2015, er bæði turrur og hartil snøggur, tí sum fyrsti tunnil í Føroyum eru bæði veggir og loft fullsprænd við betong.

Arbeiðsbýtið millum Articon og LNS hevur í høvuðsheitum verið, at LNS hevur borað og sprongt tunnilin ígjøgnum, meðan Articon hevur gjørt dren- og leiðingargrøv, dragirør, betongportalarnar og tilkoyringarvegir, har grótið úr tunlinum er nýtt.

Viðareiðistunnilin er tann 19. ferðslutunnilin, sum er gjørdur í Føroyum, síðani farið varð undir Hvalbiartunnilin, ið var liðugur í 1963.

Seinastu ferðslutølini, sum eru frá 2012 vísa, at tað í miðal koyrdu 432 akfør um samdøgrið eftir Viðareiðisvegnum. Í 2024 er ferðslan mett at vera komin upp í 510 akfør.

### Fakta

Arbeiðsánari: Samferðslumálaráðið
Byggiharri: Landsverk
Byggiharraráðgevi: LBF
Tekniskur ráðgevi: LBF
Fakeftirlit tunnil: Spenn
Fakeftirlit vegir: LBF
Arbeiðstakari: Samtakið Articon-LNS
Samlaður fíggjarkarmur: 162 mió. kr.







# EIN LÆTTI AT FÁA TUNNIL TIL VIÐAREIÐIS

**Tað verður eitt stórt framstig fyri Viðareiði at fáa tunnil til bygdina. Hetta eru tey bæði, Hanus Kjølbro og Marjun á Høvdanum Andreasen, sum bæði hava verið fyri óhappi á Viðareiðisvegnum orsakað av ávikavist omanlopi og skriðulopi, samd um.**



*Hanus Kjølbro er sera fegin um at sleppa undan Viðareiðisvegnum, nú tunnilin letur upp á sumri 2016.*



*Eisini Marjun á Høvdanum Andreasen fegnast um, at tað skjótt verður koyrandi í tunli til Viðareiðis, so tað slepst undan vandamikla Viðareiðisvegnum.*

Tað gongur ikki dagur, har klaksvíkingurin Hanus Kjølbro, sum býr á Viðareiði, hugsar um tann vakra várdagin í mars 2009, tá hann fekk grót á bilin, sum gjørdist vrak.

Myrkt var, tá hann saman við trý ára gomlu dóttur síni, ið sat íbundin í barnastóli á forsetrinum, kom koyrandi eftir Viðareiðisvegnum móti Viðareiði. Brádliga hoyrir hann eitt øgiligt buldur og gerst sjálvandi ómetaliga skakkur, tí hann veit, at nakað er heilt galið.

Hanus Kjølbro ivast ikki í, at talan er um omanlop, men nær ikki at síggja steinin ella steinarnar, sum hava rakt bilin, ið gjørdist vrak av hendingini.

Klaksvíkingurin á Viðareiði greiðir frá, at hann sjálvandi beinanvegin boðaði politinum frá, og at politisturin, sum kom á staðið, hevur greitt honum frá, at var bilurin komin á staðið tríggjar hundraðapartar av einum sekundi fyrr, so hevði dóttirin fingið grótið á seg, og tá hevði ikki borist boð í bý hjá henni.

– Hendingin var ein stórur skelkur, sum hevur ávirkað meg sera nógv. Í tonkunum havi eg nýtt ómetaliga langa tíð at hugsa hetta splittsekundið ígjøgnum, og hvat hevði hent, um so var, at vit vóru tað fyrr á staðnum, sigur Hanus Kjølbro, ið arbeiðir sum lærari á Sjónám í Klaksvík, og tískil hvønn gerandisdag má koyra minst tvær ferðir eftir Viðareiðisvegnum til og frá arbeiði, eins og aðrir íbúgvar á Viðareiði gera.

## Rætt at gera Viðareiðistunnil fyrst

Tilburðurin 6. mars 2009 hevur havt stórar sinnisligar avleiðingar fyri Hanus, tí tað gongur ikki dagur, har hann ikki hugsar um hendingina.

– Fyrstu tíðina fekk eg ógvuslig hábrøgd í andlitið, tá eg nærkaðist og koyrdi fram við staðnum, har omanlopið hendi. Frá fakfólki havi eg fingið at vita, at hetta botnar í eini angist, sum eg fekk aftan á hendingina. Vóru vit komin fyrr, ella hevði grótið rakt bara eitt lítið sindur seinni, so áttu vit ikki eina 10 ára gamla dóttur í dag, sigur Hanus Kjølbro.

Tað hendi so skjótt, at hann ikki náddi at síggja grótið, hóast hann seinni fór at hyggja, tí grótið var farið upp um bilverjuna og endaði niðan fyri vegin millum túsundtals aðrar steinar.

– Eftir hendingina líktist eg at kalla einum boksara eftir 13. umfar, tí høvdið hevði tikið í róðrið ella forrútin, sigur Hanus Kjølbro.

Hann ivast ikki í, at rætt var at velja at gera Viðareiðistunnilin fyrst, tí tað er har veruligi vandin fyri tey bilferðandi er, og ikki í sambandi við tunlarnar Norður um Fjall, hóast hann ikki á nakran hátt vil rósa teimum.

– Teir tunlarnir eru meira eitt „irritatiónsmoment“ enn ein veruligur vandi, sum Viðareiðisvegurin er. Tey 18–19 árini, eg havi undirvíst í Klaksvík, eri eg ikki sloppin til arbeiðis einar 10 ferðir, og tað hevur eina og aleina verið orsakað av viðurskiftum á Viðareiðisvegnum og ikki av tunlunum Norður um Fjall, sigur Hanus Kjølbro.

## Koyrdi inn í skriðulop

Hóast ikki so álvarsligt sum hjá Hanusi Kjølbro, hevur Marjun á Høvdanum Andreasen eisini verið fyri óhappi á Viðareiðisvegnum. Hetta hendi eftir nakrar dagar við serliga nógvum avfalli, ið mundi vera høvuðsorsøkin til eitt størri skriðulop oman á Viðareiðisvegin.

Tað var í september 2004, at tann tá 24 ára gamla Marjun á Høvdanum Andreasen, sum starvaðist á dagstovni í Klaksvík, var á veg heim aftur til Viðareiðis.

– Tað oysti niður og kendist, sum onkur spulaði á forrútin. Í veruleikanum minnist eg ikki heilt tað, sum fór fram, men eg var komin niðan á Leiti, tá eg merkti smásteinar undir bilinum og royndi at bremsa. Bilurin gleið og endaði í eini grótrúgvu, sum gekk tvørtur um vegin, sigur Marjun á Høvdanum Andreasen, sum royndi at bakka bilin leysan, uttan at hetta eydnaðist.

Vatnið floymdi oman móti bilinum, og smásteinar rullaðu inn á hann.

– Eg fór eitt sindur í panikk og royndi at ringja til hús, men tað gekk ein løta, áðrenn nakar svaraði, og henda løtan kendist sera long, sigur Marjun á Høvdanum Andreasen.

Hon fekk tó fatur á pápanum og fekk sagt honum, hvat hent var, og hvar hon stóð. Síðani var bara at bíða, hóast løtan kendist sera long við nógvum tonkum í høvdinum.

Tá pápin var komin fram, skundaði hon sær út úr bilinum gjøgnum skriðuna og inn í bilin hjá honum. Tey settu kós móti Viðareiði, og allastaðni har tey koyrdu, lógu steinar og smágrót, sum bóru boð um, at aðrar skriður kundu vera á veg.

Marjun á Høvdanum Andreasen og Hanus Kjølbro vísa á, at tað hvønn dag koyrir bussur við umleið 40 skúlabørnum, og tað hevði ikki verið gamansleikur, um grót hevði rutt oman á bussin. Tey halda tí, at tað hevur alstóran týdning at fáa tunnilin lidnan, so tað slepst undan vandamikla Viðareiðisvegnum. Samstundis fegnast tey um, at arbeiðið varð framskundað og hevur gingið so væl, at tunnilin kann takast í nýtslu næstan eitt ár undan upprunaligu tíðarætlanini.

# GÓÐUR TRIVNAÐUR Í MYLNUTÚNI

**Hóast smávegis byrjanartrupulleikar, sum eru vanligir, tá flutt verður í nýggj hølir, trívast íbúgvarnir í nýggja sambýlinum fyri vardar bústaðir við Mylnutún í Klaksvík sera væl undir nýggju og rúmligu umstøðunum.**



Tað var ein stórur dagur í november 2015, tá Sambýlið við Mylnutún í Klaksvík varð tikið alment í nýtslu. 12 vardar íbúðir til líka so nógvar íbúgvar, ið nú kundu kalla sambýlið sítt nýggja heim.

Stórur tørvur hevur verið á vardum bústøðum til fólk við skerdum førleika, og við hesum í huga settu politisku myndugleikarnir fyri nøkrum árum síðani gongd á arbeiðið at byggja sambýlir.

Politiskt varð avgerð tikin um, at farast skuldi burtur frá politikkinum at keypa vanlig sethús og umbyggja tey til sambýlir. Ístaðin varð farið undir eina tilgongd at byggja nýggjar, tíðarhóskandi bústaðir, sum eisini yvir tíð kunnu koma í staðin fyri nøkur av verandi sambýlum. Fleiri av hesum vardu bústøðunum ella sambýlunum eru longu tikin í nýtslu.

Hósdagin 19. november 2015 var hátíðarhald í Mylnutúni, har nógv fólk vóru komin á vitjan. Blásarabólkurin Ælabogin, ið er settur saman av tónleikarum við menningartarni, spældi, og saman við teirra avvarðandi fingu fleiri av nýinnfluttu íbúgvunum møguleikan at vísa sínar snotuligu íbúðir fram fyri gestunum.

## Gott at flyta í sambýli

Fyri 29 ára gomlu Martu Hansen úr Klaksvík, sum til í november búði heima hjá foreldrunum, hevur tað verið eitt stórt framstig at koma inn á heimið við Mylnutún.

– Eg skal líka venja meg við, at tað kanska hoyrist eitt sindur væl inn, nú vit búgva so nógv saman, enn tá tú í stóran mun er einsamallur heima saman við bert fáum húsfólkum, sigur Marta Hansen.

Eins og leiðararnir vísir hon á, at tað framvegis kunnu gerast ábøtur.

Oddbjørg Højgaard, ið er eindarleiðari, og Ester Áarskarð, varaleiðari, nevna nøkur viðurskifti, har tað hevði verið gott við betringum. Eitt nú er felagskøkurin heldur lítil, men pláss er tíbetur fyri at vaksa um hann. Eisini mangla goymslurúm, súkkluskúrur, hjallur og eitt massasjurúm.



*29 ára gamla Marta Hansen úr Klaksvík er fegin um at hava fingið sína egnu íbúð í Sambýlinum við Mylnutún. Áðrenn búði hon heima hjá foreldrunum.*

Tørvur er somuleiðis á betri drening uttanfyri, tí tað standa oftani hyljar, har vatnið ikki sleppur burtur.

Leiðararnir í Mylnutúni eru tó samdir um, at nógv av tí, sum tær vísa á, uttan iva verður loyst sum fráliður.

Arbeiðið at byggja sambýlið gekk væl, og byggikostnaðurin helt.

### Fakta

Arbeiðsánari: Almannamálaráðið
Byggiharri: Landsverk
Ráðgevarar: Arkitektar 99, HMP Consult, PB Consult, KJ Elráð
Høvuðsarbeiðstakari: Kanjon
Kostnaðarætlan: 16,5 mió. kr.





# ORKUTAK SUM ÍKAST TIL BYGNINGAVIÐLÍKAHALD

**Landsverk umsitur umleið 230.000 fermetrar av bygningum fyri aðalráðini. Á hvørjum ári leggjast fleiri bygningar afturat bygningahópinum. Raksturin og viðlíkahaldið av hesum almennu ognum verður alsamt meira víðfevnandi og tyngir almenna búskapin.**

Árliga játtanin hjá Landsverki til viðlíkahald av bygningum landsins er 22 mió. krónur. Hetta er alt ov lágt sett í mun til eftirsleipið, sum er mett til heilar 250 mió. krónur. Bara bráfangistørvurin er nú komin upp á slakar 124 mió. krónur. Samstundis sum eftirsleipið bara veksur, leggjast nýggir bygningar afturat á hvørjum ári. Av komandi nýggjum fermetrum at viðlíkahalda kunnu nevnast Glasir í 2017, H – bygningurin á Landssjúkrahúsinum í 2020 og fleiri miðnámsskúlar og sambýlir. Fermetratalið fer tá at tátta í 300.000 fermetrum.

Landsverk ynskir at ganga á odda við at fáa eitt nøktandi góðskustøði á øllum almennum bygningum. Tískil er alneyðugt at hugsa nýtt og velja loysnir, ið onkursvegna kunnu fáa verandi viðlíkahaldsjáttan at røkka longst møguliga. Eitt boð upp á eina loysn, ið sjálvandi ikki loysir allar trupulleikar, men sum við vissu er eitt stig rætta vegin við stórum møguleika fyri sparingum, er at orkuumvæla almennar bygningar. Í hesum árinum verður farið undir verkætlanina „Orkutak", har Landsverk saman við avvarðandi stovnum fíggjar neyðugar orkuumvælingar í bygningunum.

## ORKUTAK í staðin fyri ESCO

Í 2014 fór Landsverk undir royndarverkætlanina ESCO við undirheitinum „Orkusparing í almennum bygningum". Endamálið við verkætlanini var at fáa privatar íleggjarar at gera íløgur í orkuumvælingar av bygningum landsins. ESCO-verkætlanin rakk tó ikki á mál. Ov lítil undirtøka var í vinnuni fyri hesum leisti, og avgerð varð tí tikin um at sleppa verkætlanini. Arbeiðið við ESCO leistinum var tó ikki til fánýtis. Gjøgnum hesa verkætlan hevur Landsverk ognað sær vitan og tilfar, sum nú ber til at arbeiða víðari við.

Nýggja átakið hjá Landsverki kallast „Orkutak". Átakið fevnir um bæði orkuátøk í sjálvum bygninginum, so sum at bjálva, skifta orkukeldu, stýringar og annað, og eftir at átøkini eru framd, at skipa fyri leiðbeining og kunning til lyklapersónar og starvsfólk á staðnum. Slík orkuátøk kunnu bøta um samlaðu rakstrarstøðuna við at minka um orkunýtsluna, umframt at tað eisini lyftir bygningin upp á eitt hægri góðskustøði, bæði í mun til byggitøkniligu- og listarligu góðskuna, inniluft, rakstrarkostnað, útlát og annað. Avbjóðingin er so at tryggja, at hesi uppbygdu virðir og íløgur verða varandi og ikki forfarast orsakað av manglandi dagligum viðlíkahaldi.




*Orkan verður roknað í kWh, har miðalnýtslan seinastu fýra árini verður brúkt sum grundarlag undir gjaldinum. Stovnurin skal so gjalda 95% av hesum í avtalutíðini. Landsverk brúkar tey 15% til framtíðar orkuíløgur.*




*Árliga játtanin til viðlíkahald av bygningum er 22 mió. krónur. Eftirsleipið er mett til heilar 250 mió. krónur.*

## Húsavarðartænasta undir Landsverki

Hugskotini eru mong fyri at røkka longri við viðlíkahaldinum. Við oman fyri nevndu orkuátøkum fær Landsverk savnað saman eina ávísa peninganøgd, sum so aftur kann nýtast til onnur orkuátøk. Men er einki dagligt viðlíkahald av teimum bygningum, sum Landsverk ger íløgur í, t.e. orkuumvælir og annað, so forfarast hesi virðir aftur.

Landsverk hevur ábyrgdina av størri og smærri viðlíkahaldsuppgávum so sum at skifta vindeygu og bygningalutir, t.e. av útskiftingum og umvælingum, men ikki av dagliga viðlíkahaldinum, so sum at reinsa takrennur, smyrja lás og vindeygu. Og tað er júst hetta dagliga viðlíkahaldsvirksemi, ið skal til fyri at tryggja, at bygningarnir ikki forfarast. Í løtuni er eingin trygd fyri hesum, tí lítið og einki dagligt viðlíkahald er í almennum bygningum.

Landsverk hevur tí ætlanir um at seta í verk og miðsavna eina húsavarðartænastu undir Landsverki, ið skal taka sær av dagligu uppgávunum í almennu bygningunum. Hetta er nakað, sum onkrar av størru kommununum longu hava gjørt við góðum úrsliti. Eitt viðlíkahaldstoymi, samansett av handverkarum við ymiskum førleikum, sum Landsverk samskipar og gagnnýtir eftir tørvi, hevði sett gongd á dagliga viðlíkahaldið og tryggjað, at virðið í framdum íløgum ikki fellur. Fáir bygningar hjá landinum hava í dag nakran fastan húsavørð. Trupulleikin við at hava ein húsavørð er, at hesin má loysa allar uppgávur. Hevur tú hinvegin eitt fakliga samansett toymi og eina miðsavnaða stýring, er lættari at senda rætta viðkomandi avstað til ávísu uppgávura.



## Leisturin fyri Orkutak

1: Landsverk staðfestir orkunýtsluna í bygninginum við at kanna orkunýtsluna fýra ár aftur
2: Landsverk ger avtalu við stovnin um yvirtøku av orkurokning og avrokning
3: Landsverk fremur ætlaðu orkuumvælingarnar í bygninginum
4: Ánarin rindar bert 95% av miðalorkunýtsluni seinastu fýra árini í eitt 8–10 ára skeið
5: Landsverk brúkar orkusparingina til aðrar orkuíløgur
Eftir 8–10 ára skeiðið verður gjaldið hjá ánara til veruligu upphæddina









# MEIRA FYRI MINNI VIÐ SPRÆNIASFALTI

**Landsverk asfalterar umleið 10 kilometrar um árið fyri umleið 10 mió. krónur. Tørvurin er 25 kilometrar um árið, og samlaða eftirsleipið viðvíkjandi asfaltering er í løtuni 100 mió. krónur. Royndir verða nú gjørdar við alternativum asfalteringarhættum til minni ferðslutungar vegateinar. Eitt nú við spræniasfalti, ið er ein munandi bíligari loysn, men tó við styttri livitíð.**

Landsverk hevur seinastu nógvu árini lagt seg eftir at menna asfaltøkið í Føroyum. Ein royndarstova innan asfalt og grót er í Hundsarabotni, og tætt samstarv er við stovnar og virkir uttanlands innan menning av bæði asfalti og øðrum vegáleggingum. Hesar royndir og sambond koma væl við, tá nú aðrir og bíligari asfalteringarhættir mugu takast í brúk fyri at fáa viðlíkahaldið av infrakervinum at røkka longri út í krókarnar, ella røkka longri fyri minni.

Spræniasfalt er ein væl kendur framleiðsluháttur uttanlands. Umleið 25 prosent av danska vegakervinum verður viðlíkahildið við spræniasfalti. Tá hetta slagið av asfalti er lagt á rætt, økir tað livitíðina á einum vegi við upp til 15 árum ella longri.

Í Føroyum hevur hesin asfalteringarháttur ikki verið brúktur seinastu 10 árini, men er nú tikin uppaftur.

Spræniasfalt er væl egnað, har lítil ferðsla er og er nógv bíligari enn heitt asfalt, men livialdurin kann vera styttri, um talan er um nógva ferðslu. Á vegum við lítlari ferðslu hevur spræniasfalt eins langa livitíð og heitt asfalt. Sum dømi kann nevnast, at spræniasfalt var lagt á Kunoyarvegin í trimum løgum í 1988. Kunoyarvegurin er ikki asfalteraður síðani, og tí hevur asfaltið hildið í 28 ár.

Sparingin í mun til vanliga asfaltering er millum 50 og 75 prosent. Munur kann tó vera á prísinum alt eftir, hvar í landinum tað verður asfalterað, og hvussu stórar nøgdirnar eru. Fyri at kunna samanbera prísirnar, er neyðugt at taka hædd fyri hesum.

Spræniasfalt er tó meira viðkvæmt at fáast við, tá hugsað verður um veðrið. Best er at leggja hetta slagið av asfalti út í tíðarskeiðinum frá juni til september, meðan heitt asfalt hevur tann fyrimun, at tað kann leggjast út árið runt, ella so leingi einki frost ella regn er.

## Meira asfalt fyri somu játtan

Bæði í 2014 og 2015 hevur Landsverk brúkt spræniasfalt ymsastaðni í landinum. Síðsta ár var ein vegateinur í Kalsoynni asfalteraður við spræniasfati. Umleið 2,5 kilometrar frá havnini á Syðradali og norðureftir, og 1 kilometur norðan fyri Húsar. Teinurin norðan fyri Húsar var ikki í lagi, tá arbeiðið var lýst liðugt at vera, og hetta arbeiðið varð seinni gjørt umaftur. Annars eru royndirnar við tí bíligara spræniasfaltinum góðar, bæði í Kalsoynni og til dømis á Oyggjarvegnum.

Royndirnar vísa, at brúkar tú heittblandað asfalt til ferðslutungar vegir og bíligari loysnir til vegateinar við minni ferðslu, so ber til at fáa millum 25 og 50 prosent meira asfalt fyri somu árligu játtan. Her er hædd tikin fyri roknaðu livitíðini. Av samlaða landsvegakervinum í Føroyum á 460 kilometrar hevði spræniasfalt verið væl egnað at brúkt til umleið 260 kilometrar og heitt asfalt til hinar 200 kilometrarnar við meiri ferðslu.

Spræniasfalteringin er dygdargóð og bílig, og ætlanin er at halda fram við hesi loysn í Kalsoynni. Tað er harafturat ætlanin at nýta hetta tilfar fleiri aðrastaðni í landinum. Millum annað á Kunoyarvegnum, Elduvíkarvegnum og Oyggjarvegnum.

## Loysir ikki trupulleikan við eftirsleipi

Royndirnar siga, at ein vanligur vegur skal asfalterast í miðal 20. hvørt ár. Er talan um ein ferðslutungan veg, eigur hesin at verða asfalteraður 12. hvørt ár.

Í løtuni er støðan tann, at ein fimtingur av landsvegakervinum í Føroyum eigur at verða asfalteraður skjótast tilber. Játtanin til viðlíkahaldið av landsvegakervinum røkkur ikki til tann átrokandi tørv, ið er á asfaltering kring landið. Sjálvt við bíligari asfalteringarhættum ber ikki til at innheinta stóra eftirsleipið á landsvegakervinum. Sum er, asfalterar Landsverk undir 10 kilometrar um árið. Hetta ber í sær, at tað við verandi játtan fer at taka oman fyri 50 ár at koma út í hvønn krók í landinum.

### Fakta um asfaltering við spræniasfalti

Fyrsta stigið í viðgerðini er, at vegateinurin verður sópaður, eftir at sporslit møguliga er fresað burtur. Samstundis skal ein tillaging og aðrar smærri umvælingar møguliga gerast. Tá ið undirstøðið er í lagi, verður eitt lag av bitumen sprænt á vegin. Bitumen er innflutur oljuúrdráttur, sum vanliga verður nýtt sum asfaltbindievni. Eftir hetta verður skervur lagdur á og skynsamt trumlaður við vibratiónstrumlu á gummihjólum – ein framferðarháttur, sum tryggjar, at allur skervurin verður festur til bindievnið. Slitstyrkin er stór, og omanávatn verður forðað í at seta niður í áleggingina, og harvið økist styrkin og støðufestið í teimum berandi løgunum.

### Væl kent í Føroyum

Fyrstu ferð spræniasfalt varð nýtt í Føroyum var í 1966 á landsvegnum millum Hósvík og Kollafjørð. Hesin asfalteringarháttur hevur síðani verið nógv brúktur í Føroyum. Serliga árini, tá nýgerð av vegum kring landið var í hæddini og trupult var at flyta heitt asfalt millum oyggjarnar. Síðani er nýtslan av spræniasfalti minkað niður í einki fyri heilt at hvørva seinastu 10 árini.




*Talvan vísir árliga miðalprísin á útløgdum asfalti árini 2013 – 2015. Orsøkin til lækkandi fermetraprísin fyri asfaltering er, at ein partur av infrakervinum seinastu tvey árini er asfalteraður við spræniasfalti, sum er munandi bíligari enn vanliga asfaltið. Ì hesum prísi er lagt upp fyri styttru livitíðini á spræniasfalti.*

# SKRÁSETT FERÐSLUÓHAPP Í ÁRUNUM 2000–2015

**Á hvørjum ári verða fleiri fólk álvarsliga skadd ella doyggja í ferðsluni í Føroyum. Skal fyribyrgingararbeiðið á økinum gerast betri, er neyðugt við tættari samstarvi millum partarnar um skráseting og gransking av øllum ferðsluóhappum og -vanlukkum, sum henda á vegakervinum. Hagtølini niðanfyri vísa gongdina seinastu 15 árini.**

Skrásett ferðsluóhapp




*Gongdin seinastu árini hevur verið, at talið á skrásettum ferðsluvanlukkum er minkandi. Í 2015 var tó aftur ein vøkstur. Yvirlitið fevnir bert um ferðsluóhapp, ið eru skrásett hjá Politinum.*

Deyð fyri hvørji 100.000 í Norðurlondum




*Tað ber til at samanbera við hini Norðurlondini, tá talan er um deyð fyri hvørjar 100.000 íbúgvar. Føroyar eru í 2015 undir hinum, men av tí at talan er um so smá tøl, eru sveigginí so stór, at onnur ár eru Føroyar langt omanfyri. Tí verður roknað við einum miðaltali yvir nøkur ár. Tey tølini vísa, at miðaltalið yvir bæði 10 ár og 5 ár er væl oman fyri hini Norðurlondini.*

Ferðsluóhapp við fólkaskaða




*Talið á skaddum í ferðsluni er vaksið nakað aftur seinastu árini, men av tí at tølini bara eru grundaði á upplýsingar frá Politinum á skaðastaðnum, ber ikki til við vissu at siga, um talan er um fleiri skadd ella bara fleiri, ið verða send til kanningar. Best hevði verið at fingið skrásetingar frá skaðastovunum sjálvum.*





# LANDSVERK Á ODDA FYRI BYGGIHARRASAMTAKI

**Felagið fyri yrkisbyggiharrar í Føroyum setti 1. apríl 2016 samskipara í starv, hvørs endamál í størri mun er at mynda arbeiðið hjá felagnum, eins og at gera strategiskar ætlanir fyri virksemið. Limirnir í Byggiharrasamtaki Føroya, sum felagið kallast, hava samtykt, at Landsverk skal hava føddan formann, og at felagið skal hava skrivstovu á Landsverki.**

Stóra byggivirksemið í Føroyum í hesum árum hevur fingið Byggiharrasamtak Føroya at brynja seg til nýggja veruleikan og seta í starv ein samskipara, sum skal mynda arbeiðið hjá samtakinum og gera strategiskar ætlanir fyri virksemið. Serliga við atliti at byggiverkætlanum innan tað almenna, sum í løtuni mynda byggivirksemið í Føroyum. Tí hava limirnir í Byggiharrasamtaki Føroya gjørt av at víðka um virksemið hjá samtakinum við tí fyri eyga at geva eitt betri íkast til menningina av bygging í Føroyum.

Í starvið sum samskipari er sett 35 ára gamla Marjun Olsen Lützen, ið er ættað úr Klaksvík og útbúgvin cand. mag. í altjóða viðurskiftum og alheimsgerð frá Aalborg Universiteti. Seinastu tvey árini hevur Marjun Olsen Lützen verið skrivari og fulltrúi á Sendistovu Føroya í Brússel, eins og hon hevur starvast í Skiftirættinum á Dómaraskrivstovuni í Havn.

- Samskiparin skal mynda felagið fakliga og leggja upp til at loysa avbjóðingarnar í felag, eins og fáa røkt áhugamálini hjá byggiharrunum í Føroyum. Sum samtak skulu vit somuleiðis vera ein felags rødd mótvegis byggivinnuni, ráðgevum og samfelagnum annars. Vit hava somu avbjóðingar og vilja loysa hesar í felag, eins og vit vilja geva eitt betri íkast til áhaldandi menning av bygging í Føroyum, sigur Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki og formaður í Byggiharrasamtaki Føroya.

Formaðurin vísir á, at felagið eigur at ganga á odda fyri menning í byggivinnuni, og somuleiðis tillaga byggihættirnar og syrgja fyri, at nýggj og neyðug tøkni verður tikin inn í føroyska byggivinnu, so hvørt hon kemur fram. Eisini skal Byggiharrasamtakið slóða vegin fyri almenna byggipolitikkinum.

Í Byggiharrasamtaki Føroya eru í løtuni níggju limir, sum telja Landsverk, SEV, Bústaðir, Eysturoyar- og Sandoyartunlar og Tórshavnar-, Klaksvíkar-, Runavíkar- Fuglafjarðar- og Eystur- kommunur.

Nevndin fyri Byggiharrasamtak Føroya er mannað soleiðis: Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki, formaður, og Hákun Djurhuus, stjóri á SEV, næstformaður. Hinir nevndarlimirnir eru Mikael Viderø, tekniskur stjóri í Tórshavnar kommunu, Karl Jakob Ósá, tekniskur stjóri í Klaksvíkar kommunu, Eyðun Petersen, tekniskur leiðari í Runavíkar kommunu, Andreas Andreasen, tekniskur leiðari í Eysturkommunu, Pætur Joensen, býarverkfrøðingur í Fuglafjarðar kommunu, Bogi Jacobsen, tekniskur stjóri í Bústaðir, og Teitur Samuelsen, stjóri í P/F Eystur- & Sandoyartunlar.

Samskiparin í Byggiharrasamtaki Føroya byrjaði í starvinum 1. apríl 2016.

# TRYGGARI Á 2 MINUS 1 VEGI

**Eitt nýtt slag av vegi skal nú standa sína roynd í Føroyum. Sokallaði 2 minus 1 vegurin er eftirhondini at finna í flest øllum donskum kommunum umframt øðrum Norðurlondum, og royndirnar higartil eru góðar. Bilarnir koyra spakuligari, fólk til gongu og á súkklu kenna seg tryggari, og nøgdsemið er sum heild betri. Fyrsti landsvegur av hesum slagi í Føroyum verður at síggja í Hvalba seinni í ár.**

Øll kenna tað. Tú gongur túr eftir einum smølum einbreytaðum vegi uttan gongu- ella súkklubreyt. Bilarnir súsa framvið, og einki er millum teg og bilin. Enki, ið verjir teg, ið er til gongu, trillar barnavogn ella súkklar. Tú kennir teg verjuleysan og sárbaran.

Júst hetta hevur fingið fleiri borgarar í donskum kommunum at klaga um ótryggleika á ávísum vegateinum. Alsamt fleiri kommunur í Danmark hava tí seinastu árini valt at royna hetta nýggja slagið av vegi sum loysn á trupulleikanum. Tá tú ger ein veg um til ein 2 minus 1 veg kanst tú betra umstøðurnar hjá júst gongufólki og fólki á súkklu innan fyri verandi vegbreidd. Talan er um vegir, har mesta ferðslan liggur um 300 bilar í meldurtíð, svarandi til eina miðal ferðslu upp í 3.750 akfør um samdøgrið.

Við hesi loysn flytir tú fólk og súkklur av sjálvari koyribreytini og út um eina breiða kantstriku á vegnum, soleiðis at tú skapar eina størri frástøðu millum hørðu og bleytu ferðsluna á vegnum. Vegaloysnin riggar væl, har tað ikki er pláss fyri at breiðka vegin og gera gongu- og súkklubreyt ella, har peningur ikki er til størri íløgu.

## Koyrimynstrið broytist nakað

Ein vanligur vegur hevur ofta tvær koyribreytir. Eina í hvønn rætning. Tá talan er um ein 2 minus 1 veg, verður ein vegbreyt tikin burtur, harav navnið. Koyribreytin verður sjónliga smalkað við eini breiðari kantstriku á báðum síðum. Sum meginregla skulu koyrandi í báðar rætningar deilast um eina felagsbreyt, og tá tað ikki eru mótkoyrandi bilar, skulu bilarnir halda seg mitt á 3,5 metur breiða vegnum innan fyri kantstrikurnar. Kemur mótkoyrandi ferðsla, kunnu bilarnir fara um brotnu kantstrikuna fyri at sleppa fram við hvørjum øðrum.

Tann koyrandi skal vera varur við, at tað kunnu verða gangandi ella súkklandi í vegjaðaranum, og neyðugt er at innrætta koyrimynstrið til hetta og koyra eftir umstøðunum. Sum á vanligum landsvegi skal bilførarin halda seg aftan fyri fólk til gongu og á súkklu, um tað ikki er møguligt at fara fram við einum mótkoyrandi, samstundis sum koyrast kann fram við fólki, ið eru til gongu.

Hetta er eitt annað slag av koyrimynstri enn tað, vit kenna frá vanligum tvíbreytaðum vegum, men líkist eitt sindur tí koyrimynstri, ið nýtt verður á einbreytaðum vegi, tí bilarnir skulu halda av fyri hvørjum øðrum.

## Hvalba fær 2 minus 1 veg

Í næstum verður farið undir at leggja seinastu hond á tann fyrsta 2 minus 1 landsvegin í Føroyum. Tað er Hvalbiar kommuna, ið hevur havt ynski um at betra umstøðurnar hjá fólki til gongu og á súkklu eftir landsvegnum fram við sandinum í Hvalba, samstundis sum, at akførini eisini skulu hava betri umstøður.

Vegurin, ið er umleið 630 metrar langur við góðum sýni á øllum vegateininum, verður samanlagt 6 metrar breiður. Harafturat verða ljós sett upp fram við vegnum. Vegurin í Hvalba væntast liðugur í ár.





*Koyrimynstrið broytist nakað á hesum vegum. Bilar skulu koyra mitt á vegnum, tá eingin mótkoyrandi bilur er á vegnum. Koyrast skal um kantstrikuna, tá tveir bilar skulu fram við hvørjum øðrum.*


*Reyða strikan á myndini er nýggi 2 minus 1 vegurin í Hvalba.*




# UPPLIV NÁTTÚRUNA Á SÓLJULEIÐUM

**Skalt tú skunda tær, ella hevur tú tíð at koyra eftir Oyggjarvegnum ein vakran summardag í staðin fyri ígjøgnum tunnilin? So gev tær stundir til at koma náttúruni nærri eftir eini Sóljuleið. Sóljuleiðirnar kring landið eru nú 13 í tali og merktar við serligum sóljuskeltum, so tú lættliga finnur tær.**

Í londunum kring okkum, t.e. bæði í Noregi og í Danmark, hava tey valt serliga vakrar vegir til ferðafólkavegir ella „Margueritrutur", sum tey hava valt at kalla tað í Danmark. Í Samferðsluætlanini fyri tíðarskeiðið 2008–2020 peikar Landsverk á nakrar landsvegateinar í Føroyum við lítlari og ongari ferðslu, ið kunnu nýtast til sonevndar Sóljuleiðir, sum er føroyska heitið fyri ferðafólkavegir.

Her kunnu ikki bara ferðafólk, men eisini føroyingar, koyra spakuliga og njóta koyritúrin og náttúruna, uttan at verða órógvaði av ferðsluni annars, ella eisini steðga á og fara úr bilinum.

## Ymisk upplivingarrúm í náttúruni

Stórur dentur er lagdur á at velja røttu støðini á landsvegakervinum til Sóljuleiðir. Hetta eru støð, sum á ymiskan hátt kunnu vísa teimum ferðandi føroysku náttúruna frá áhugaverdum og ymiskum vinklum. Lýsingar av einstøku Sóljuleiðunum eru gjørdar, og skulu tær nýtast sum grundarlag, tá leiðirnar skulu útbyggjast við eitt nú dvalarvikum og serligum útsýnisstøðum.

Her eru nøkur brot úr lýsingini um Sóljuleiðirnar, sum Halla Áargarð, landslagsarkitektlesandi, hevur gjørt fyri Landsverk:

*Tann føroyska náttúran er ein rá og ber náttúra við fjøllum og dølum, sum saman skapa eina stórfingna náttúru. Av tí at lendið í náttúruni er so bert, vera landslagsrúmini í Føroyum ikki skapt av plantum og trøum, men av sjálvum lendinum.*

*Samanspælið millum oyggjarnar skapa tey „størstu rúmini", fjøllini og dalarnir skapa tey „miðal stóru rúmini", og høvdir og stórir steinar skapa tey „lítlu landslagsrúmini".*

*„Tjørnuvíkarleiðin er eitt gott dømi um eina Sóljuleið, ið hevur tvey høvuðslandslagsrúm. Teinurin er fyri tað mesta umgirdur av brattari fjallasíðu øðrumegin og útsýninum yvir á Eysturoynna hinumegin. Leiðin inniheldur bæði long opin rúm og smá tøtt rúm, og tískil eina røð av ymiskum upplivingum, sum gevur leiðini fjølbroyttar dygdir. Tað fagurfrøðiliga hæddarpunktið er teinurin oman í bygdina Tjørnuvík, sum liggur vakurt í einum skálformaðum dali. Í bygdini sært tú yvir á Risan og Kellingina. Innrammaða útsýnið í einum týðiliga avmarkaðum rúmi gevur eina heilt serliga rúmliga uppliving."*

Kelda: Brot úr lýsing av Sóljuleiðunum eftir Hallu Áargarð, landslagsarkitektlesandi

## Ferðafólk sakna skeltir og útsýnisstøð

Tað koma alsamt fleiri ferðafólk til landið. Hetta setir eisini krøv til infrakervið. VisitFaroeIslands hevur gjørt eina kanning, ið vísir, at ferðafólk sum heild sóknast eftir betri skelting í Føroyum, t.e. bæði á landsvegunum og í bygdum øki, og at vit eisini duga betri at vísa á serlig útsýnisstøð, har til ber at seta bilin eina løtu, njóta útsýnið og taka myndir.

Á Sóljuleiðunum ræður ikki bert um at koma fram, men eins nógv um at njóta ferðina og landslagið, tú koyrir ígjøgnum, har rúmliga upplivingin kann broytast nógv frá stórfingnum opnum útsýni til tað meira tætta afturlatna nær við. Til dømis ein vakur fossur ella áarløkur í mun til tað stórbara við høgum fjøllum og panoramaútsýni. Hetta er júst tað, sum ferðafólk í kanningini hjá VisitFaroeIslands eftirlýsa:

*„We wish there would be more viewpoints/stop places along the roads so we could stop more often to take pictures, but that's just not possible with these small roads."*

Kelda: Visitors Survey 2015. VisitFaroeIslands.

Higartil eru samanlagt 13 ymiskar Sóljuleiðir í Føroyum. Dømir um Sóljuleiðir eru Múlavegurin á Borðoynni, vegurin um Eiðisskarð í Eysturoynni, Oyggjarvegurin á Streymoynni og vegirnir um Hovsegg og um Hestin í Suðuroy.






# VEGASKELTIR VERÐA DAGFØRD

**Nøgdsemiskanningar hava seinnu árini víst eina ávísa ónøgd millum fólk við skeltingina við landsvegirnar, ið fevnir um bæði vegvísingarskeltir og arbeiðsskeltir. Hetta hevur Landsverk valt at gera nakað við. Fyri nøkrum árum síðani var farið undir eina neyva gjøgnumgongd og eftirmeting av øllum skeltum á landsvegakervinum.**

Fyri at tryggja eina samanhangandi og eins vegvísing, hevur Landsverk yvirskipaðu ábyrgdina av skeltingini á høvuðsvegakervinum. Gulu vegvísingarskeltini við landsvegirnar, ið vóru sett upp í sjeyti- og áttati-árunum, lúka ikki longur dagsins krøv. Teksturin er til dømis ikki gjørdur til eina hámarksferð á 80 km/t, og harafturat hevur reglusemið og yvirskipaði samanhangurin heldur ikki verið nøktandi.

Seinastu trý árini hevur Landsverk tí arbeitt miðvíst við at betra um skeltingina á landsvegakervinum við tí endamáli at skipa vegvísingina í Føroyum soleiðis, sum gjørt verður aðrastaðni. Tað eru nú gjørdar tvær støddir av skeltum. Ein svarandi til mest loyvdu ferð upp til 50 km/t og hin, har mest loyvda ferðin er millum 50 og 80 km/t. Bæði skeltastødd, litur, skriftstødd og slag av skrift fylgja nú sama standardi.

## Fjarmál og nærmál

Vegvísingarmálið á skeltunum eru býtt upp í fjarmál, nærmál og lokalmál. Hesi eru vald eftir, hvørji landafrøðilig-, ferðafólkalig- ella samferðsluviðurskifti gera seg galdandi á staðnum.

- Fjarmál eru mál av størri týdningi, sum lýsa høvuðsvegakervið (t.d. Tórshavn, Klaksvík, flogvøllurin, Tvøroyri o.s.fr.)
- Nærmál eru onnur størri mál á vegakervinum
- Lokalmál eru onnur mál á farleiðini, sum kunnu nýtast sum vegvísingarmál

Tað verða í mesta lagi sett fýra vegvísingarmál á hvørt skeltið. Hetta verður gjørt fyri at tryggja eitt so gott yvirlit á skeltinum, sum tilber. Dentur er somuleiðis lagdur á at hava kontinuitet í vegvísingini. Tá eitt vegvísingarmál er víst á einum skelti, skal hetta endurtakast allan vegin, til komið er á mál.

Byrjað var at dagføra vegvísingarskeltini í Sandoynni, og er tað arbeiðið nærum liðugt. Í 2014 vórðu skeltir keypt inn til alla Suðuroynna. Ætlanin er at seta hesi upp í 2016. Flestu vanligu ferðsluskeltini, sum vóru í ringum standi, vóru eisini skift út í 2011, eins og nýggj skeltir til ferðafólkaleiðir eru sett upp.

## Herd krøv til arbeiðsskeltir

Vegarbeiðir ávirka ferðsluna, og hetta kann ganga út yvir ferðslutrygdina og trygdina hjá teimum, sum arbeiða við vegin. Tí eru krøvini til tey, ið arbeiða á landsvegnum, eisini herd munandi seinastu árini. Farast má ikki undir eitt vegarbeiði, fyrr enn góðkend skeltiætlan fyriliggur. Tá vegarbeiðið er liðugt, skal øll óneyðug skelting takast burtur beinanvegin, fjalast ella vendast burtur frá vegnum. Hetta hevur bøtt munandi um mannagongdina í sambandi við arbeiðsskelting og tískil eisini um trygdina hjá teimum ferðandi og teimum, sum arbeiða á ella nærhendis vegnum.









# NÓGVAR VERKÆTLANIR Í GONGD

**Stórt virksemi hevur verið og er kring landið av byggiverkætlanum undir landinum. Her er eitt yvirlit yvir tær verkætlanir, sum antin eru lidnar, standa í gerð, ella liggja á tekniborðinum og skulu í gongd í næstum.**

## Bygningar

- Skúladepilin við Marknagil – nýbygging (umrøða á øðrum síðum)
- H-bygningurin á Landssjúkrahúsinum – nýbygging og umbygging
- Depil til fjølbrekað børn og ung í Eysturoy – nýbygging
- Vardir bústaðir í Klaksvík – nýbygging (umrøða á øðrum síðum)
- Klaksvíkar Sjúkrahús – umvæling og umbygging
- Tekniski Skúli í Klaksvík – umbygging og útbygging
- Miðnámsskúli á Kambsdali – umbygging og útbygging
- Virknis- og umlættingardepil í Sandoynni – nýbygging
- Apoteksverkið – umbygging
- Kringvarp Føroya – umbygging og útbygging

## Vega- og tunnilsverkætlanir

- Nýggj farleið til Viðareiðis – tunnil og vegagerð (umrøða á øðrum síðum)
- Tjørnunes við Skálafjørðin – breiðkan av vegi
- Innkomuvegur til Havnar – nýggjur vegur, brúgv um Klingruna o.a.
- Signabøarvegurin – breiðkan
- Vegamót í Sørvági – ferðslutrygdartiltak
- Innkoyring til Kvívíkar – umbygging

## Havnir

- Ferjulegan á Krambatanga – leingja atløgubryggjuna hjá Smyrli

## Smærri verkætlanir

Á hvørjum ári fer Landsverk undir at fremja fleiri smærri verkætlanir, sum hava til endamáls at økja um ferðslutrygdina. Eitt nú seta upp gøtuljós, gera smærri umbyggingar av vegum, merkja upp, betra um skeltingina, seta upp elektronisk skelti sum ferðgáar, seta upp trygdarútgerð í tunlum, gera ábøtur á bilverjur, flyta fastar lutir burtur frá vegjaðaranum, tryggja økir fram við vegnum og so framvegis. Eisini seinasta árið eru fleri av slíkum verkætlanum gjørdar.



*Nýggi bygningurin, sum Havnar Arbeiðarafelag hevur latið byggjað saman við upprunaliga bygninginum, tekur seg væl út í býarmyndini í Havn. Umframt høvuðsskrivstovuna hjá Landsverki, húsast Fjølsmiðjan hjá ALS og skrivstovan hjá Havnar Arbeiðarafelag í bygningunum.*

# BETRI UMSTØÐUR VIÐ TINGHÚSVEGIN

**Fyrst í 2016 varð so smátt farið undir at flyta inn í nýggja bygningin hjá Havnar Arbeiðarafelag, ið eisini eigur gamla bygningin við Tingshúsvegin, har høvuðsskrivstovan hjá Landsverki hevur húsast í mong ár.**

Hóast talan ikki er um so nógvar fermetrar afturat, so hevur høvuðsskrivstovan hjá Landsverki fingið sera góð hølisviðurskifti, eftir at nýggi bygningurin hjá Havnar Arbeiðarafelag, ið stovnurin leigar frá, var klárur at flyta inn í stutt eftir ársskiftið. Bygningurin, sum lá á staðnum frammanundan, var rivin niður, tí eigarin metti hann vera ótíðarhóskandi og í vánaligum standi.

Frá at hava verið einasti leigari í bygningunum við Tinghúsvegin, er ein leigari nú komin afturat. Talan er um Fjølsmiðjuna hjá ALS, sum frammanundan lá uppi á Hjalla, men nú húsast yvir av høvuðsskrivstovuni hjá ALS, ið liggur hinumegin Tinghúsvegin. Harumframt er eigarin, Havnar Arbeiðarafelag, flutt inn í veghæddini í nýggja bygninginum við síni skrivstovu.

Við at hyggja at innrættingini frá í neðra av, so er matstova, ymisk arbeiðsrúm og goymslurúm niðast. Á 2. hædd er móttøka og skrivstova hjá Havnar Arbeiðarafelag í nýggja bygninginum, meðan Landsverk hevur skrivstovuhølir og hølir til onnur endamál í gamla bygninginum. Fjølsmiðjan hevur leigað seg inn á 3. hædd í báðum bygningunum og ræður somuleiðis yvir einum parti av kjallaranum.

4. hædd hýsir deildini fyri Infrakervi hjá Landsverki, og Framleiðsludeildini, sum frammanundan hevur hildið til í leigaðum hølum í Bøkjarabrekku, men nú kann flyta inn á Tinghúsvegin saman við hinum deildunum á høvuðsskrivstovuni. Somuleiðis er ein partur av Stjórnardeildini við KT og HTU á hesi hæddini.

Á ovastu hædd, sum er 5. hædd, eru Stjórnardeildin og Byggideildin hjá Landsverki.

Starvsfólkini eru væl nøgd við nýggju umstøðurnar í samanløgdu bygningunum, ið síggjast væl í býarmyndini.

Ráðgevarar í sambandi við byggingina hava verið EM-Ráðgeving og Hanus Olsen, og høvuðsarbeiðstakari, Búsetur.



ÁRSFRÁGREIÐING 2015–2016

LANDSVERK
*byggir land*